# SÁTTMÁLI

millum

Akademikarafelag Føroya
(vegna Føroyskar Sálarfrøðingar)

og

Fíggjarmálaráðið

um

fíggjarligt ískoyti til sálarfrøðiliga viðgerð

Gildiskoma 1. januar 2024

## Kapittul 1 – Inngangur

**§ 1.** Hesin sáttmáli um ískoyti til gjald til viðgerð hjá privatstarvandi sálarfrøðingi er gjørdur millum Akademikarafelag Føroya (vegna felagið Føroyskar Sálarfrøðingar) og Fíggjarmálaráðið.
*Stk. 2.* Starvsøkið, sum sáttmálin fevnir um, eru allar Føroyar.

**§ 2.** Sáttmálin fevnir um viðgerð hjá privatstarvandi sálarfrøðingi, sum er ásett í kunngerð um ískoyti til sálarfrøðiliga viðgerð hjá privatstarvandi sálarfrøðingi.
*Stk. 2.* Aðrar avtalur millum Fíggjarmálaráðið og sálarfrøðingar um sálarfrøðiviðgerð mugu ikki gerast uttan semju millum sáttmálapartarnar.

## Kapittul 2 – Treytir fyri at virka undir skipanini

**§ 3.** Sálarfrøðingur undir hesum sáttmála, skal:

a) ikki vera í øðrum føstum starvi í meira enn 15 tímar um vikuna ella 40% av vanligari arbeiðstíð, og arbeiða sum privatstarvandi sálarfrøðingur í í minsta lagi 22 tímar um vikuna ella 60% av vanligari arbeiðstíð.
b) hava førleika svarandi til í minsta lagi autorisatión frá danska Psykolognævnet, ella javnbjóðis førleikastøði,
c) hava skjalprógvaðar starvsroyndir við teimum sjúklingum/uppgávum, sum hesin sáttmálin fevnir um.
d) Í serligum føri kann Heilsutrygd í samráði við felagið Føroyskir Sálarfrøðingar gera frávik frá krøvunum í punkti a).

**§ 4.** Sálarfrøðingur, sum ynskir at verða fevndur av hesum sáttmála, skal senda umsókn hesum viðvíkjandi til Heilsutrygd.
*Stk. 2.* Í samráð við Føroyskar Sálarfrøðingar kannar Heilsutrygd, um sálarfrøðingurin lýkur treytirnar um førleikar, sum eru ásettir í hesum sáttmálanum.
*Stk. 3.* Heilsutrygd og felagið Føroyskir Sálarfrøðingar skulu góðkenna umsóknina/upptøkuskjalið, áðrenn sálarfrøðingurin fær loyvi at virka eftir sáttmálanum.

**§ 5.** Teir sálarfrøðingar, sum eru umfataðir av hesum sáttmála, hava skyldu til at útinna viðgerð sambært ásetingunum í sáttmálanum.
*Stk. 2.* Sálarfrøðingurin skal kunna seg um sáttmálaavgerðir og fyrisitingina av teimum.

**§ 6.** Sálarfrøðingur, sum hevur farloyvi vegna barnsburð, sjúku ella av øðrum orsøkum, kann lata virksemið til annan sálarfrøðing. Farloyvi kann vanliga ikki vara longur enn 1 ár. Heilsutrygd skal góðkenna farloyvi, sum er longur enn 1 ár.
*Stk 2.* Heilsutrygd tryggjar sær, at sálarfrøðingurin, sum verður vikarur, lýkur treytirnar í § 3.

**§ 7.** Sálarfrøðingur kann við 3 mánaða freist til 1. í einum mánaði boða frá, at viðkomandi tekur seg úr arbeiðnum sambært hesum sáttmála.
*Stk. 2.* Uppsøgnin skal vera skrivlig og skal sendast Heilsutrygd.

**§ 8.** Sálarfrøðingurin skal regluliga veita viðgerð í viðtaluhøli sínum. Viðgerðin kann veitast aðrastaðni, t.d. í øðrum hóskandi viðtaluhøli, heima hjá sjúklingi, ella sum fjarviðtala við telefon

ella teldu/teldli. Í hesum førum skal sálarfrøðingurin halda seg til galdandi avtalur viðvíkjandi gjaldi og umsiting.
*Stk. 2.* Sálarfrøðingurin hevur skyldu til at veita viðgerð innan rímiliga tíð, eftir at sjúklingur hevur vent sær til hansara/hennara.

**§ 9.** Sálarfrøðingurin skjalprógvar viðgerðir sínar.

**§ 10.** ***Skjalagoymsla:***
Skjalagoymslan skal skipast sambært galdandi lóggávu og reglum. Heilsutrygd kann gera nærri reglur um, hvussu skjøl skulu verða goymd.

**§ 11.** Heilsutrygd ger ein lista við teimum sálarfrøðingum, sum virka í skipanini. Heilsutrygd og felagið Føroyskir Sálarfrøðingar kunna á alnetinum um skipanina.

## Kapittul 3 – Ávísing, val av sálarfrøðingi v.m.

**§ 12.** Tá ið viðgerðin byrjar, skal sjúklingurin hava við sær skrivliga ávísing frá kommunulækna. Á ávísingarseðlinum skal standa kunning um orsøk til ávísingina.
*Stk. 2.* Um kommunulækni heldur, at sjúklingurin hevur bráðfeingis tørv á sálarfrøðiligari viðgerð, kann ávísingin fara fram á annan hátt. Í slíkum førum skal kommunulæknin skjótast gjørligt senda skrivliga ávísing.
*Stk. 3.* Sálarfrøðingurin boðar ávísandi kommunulækna frá gongdini av viðgerðini, tá ið tað er umbiðið, ella tá ið sálarfrøðingurin heldur, at tað hevur týdning fyri sjúklingin.

**§ 13.** Ávísingin er bert galdandi, um sálarfrøðingur fær hana í seinasta lagi 3 mánaðir eftir, at hon er skrivað.

**§ 14.** Ein ávísing fevnir um í mesta lagi gjald fyri 12 viðtalur fyri hvønn av tilburðunum, sum eru ásettir í kunngerð um fíggjarligt ískoyti til sálarfrøðiliga viðgerð hjá privatstarvandi sálarfrøðingi.

**§ 15.** Í sambandi við ávísing til viðgerð hjá privatstarvandi sálarfrøðingi skal ein góðkendur ávísingarseðil nýtast. Heilsutrygd, Føroyskir Sálarfrøðingar og Kommunulæknafelag Føroya skulu góðkenna ávísingarseðilin.

**§ 16.** Sjúklingar kunnu frítt velja ímillum teir privatstarvandi sálarfrøðingarnar, sum eru fevndir av hesum sáttmála.
*Stk. 2.* Sjúklingar kunnu undir viðgerðini velja annan privatstarvandi sálarfrøðing. Viðtalutalið, sum er ásett sambært § 14, verður ikki broytt, um annar privatstarvandi sálarfrøðingur verður valdur eftir 1. viðtalu.
*Stk.3.* Sálarfrøðingurin kann undir serligum umstøðum vísa frá sær at viðgera sjúkling. Um so er, skal sálarfrøðingurin tryggja, at sjúklingurin verður vístur til annan sálarfrøðing.

**§ 17.** Avboð frá sjúklingi skal vanliga fráboðast dagin fyri viðtaludagin.

*Stk. 2.* Gevur sjúklingur ikki, uttan serliga orsøk, avboð dagin fyri tann dagin, viðtalan er, kann sálarfrøðingurin áleggja viðkomandi at gjalda upphædd svarandi til gjaldið. Heilsutrygd rindar ikki í slíkum førum.
Stk. 3. Um viðtalan verður avlýst, ella sjúklingurin ikki møtir, verður hetta ikki roknað sum gjøgnumførd viðtala eftir ávísing, hóast sjúklingurin verður kravdur eftir gjaldi.

## Kapittul 4 – Gjøld

**§ 18.** Sálarfrøðiliga viðgerðin eftir hesum sáttmála verður veitt sum einstaklingaviðtalur, tveypersónaviðtalur og/ella bólkaviðtalur.

**§ 19.** Einstaklingaviðgerð varir í 45 – 60 minuttir.
*Stk. 2.* Tveypersónaviðgerð varir í 80 – 90 minuttir.
*Stk. 3.* Bólkaviðgerð (fleiri enn tveir sjúklingar) varir í 105 – 120 minuttir.
*Stk. 4.* Vanliga verður bert givin ein viðtala um dagin, bæði tá ið talan er um einstaklingaviðgerð, tveypersónaviðgerð og bólkaviðgerð.

**§ 20.** Gjøld fyri viðtalur hjá privatstarvandi sálarfrøðingi eru ásett í talvu til henda sáttmála.

**§ 21.** ***Stilling:***
Gjaldið verður sett til kr. 1.020,00 tann 1. januar 2024.
*Stk.2.* Gjaldið verður stillað 1. juli hvørt ár, tó fyrstu ferð 1. juli 2025. Stillingin tekur støði í broytingini í prístalinum (40%) og broytingini í lønarvøkstrinum (60%). Støði verður tikið í prístalinum frá november 2024 og broytingini í árslønini hjá einum tænastumanni í 33. lønarflokki, stig 1. frá 1. oktober 2024.

**§ 22.** Gjaldið er eitt bruttogjald og fevnir eisini um fyrireiking, supervisjón, skráseting og annað arbeiði og útreiðslur, sum eru knýtt at viðgerðini.

**§ 23.** Heilsutrygd rindar ískoyti sum ásett í kunngerð um fíggjarligt ískoyti til sálarfrøðiliga viðgerð hjá privatstarvandi sálarfrøðingi.

## Kapittul 5 – Avrokningarskipan

**§ 24.** Í sambandi við viðgerðir frá privatstarvandi sálarfrøðingi verður talgild avrokningarskipan brúkt. Avrokningarskipanin verður ókeypis veitt sálarfrøðingunum. Allar avrokningar við Heilsutrygd skulu við árslok 2024 vera talgildar, antin við skipan, sum Heilsutrygd veitir, ella við tilsvarandi skipan, sum sálarfrøðingarnir hava.

**§ 25.** Sjúklingurin skal vátta viðgerðina, og sálarfrøðingurin skal kunna skjalprógva hetta sambært roknskaparreglunum. Í óvanligum førum, tá ið tað ikki hevur borið til at fingið ta neyðugu váttanina, skal orsøkin til tess vera skjalfest og tøk í minsta lagi fimm ár eftir avrokning.
*Stk. 2.* Verður møguligt at vátta viðgerð á talgildan hátt, so verður hetta eisini góðtikið.

**§ 26.** Fyri hvørja rokning skal standa navn og bústaður hjá sjúklinginum, dagfesting av viðtalu, og slag av viðtalu. Á mánaðarliga avrokningarblaðnum skal eisini standa navn sálarfrøðingsins, starvsstaður og samlaða gjaldið frá Heilsutrygd.

**§ 27.** Avroknað verður mánarliga fyri allar viðtalur, sum eru skrásettar í skipanini, í undanfarna mánaði.

**§ 28.** Avrokningartilfarið fevnir um eina samlaða uppgerð, sum er avtalað millum partarnar, avrokningarbløðini og tilhoyrandi læknaávísingar.
*Stk. 2.* Sálarfrøðingingurin skal lesa (uploada) avrit av ávísing fyri hvønn sjúkling í avrokningarskipanina. Um talan verður um ein ávísingarbanka í Føroyum, so skal hesin brúkast.

**§ 29.** Útgjalding av ágóða fyri avrokningartilfarið skal fara fram á slíkan hátt, at upphæddin er tøk, áðrenn mánaðurin er farin.

**§ 30.** Sálarfrøðingurin avroknar við Heilsutrygd.

**§ 31.** Við avrokning verða útrokningar hjá Heilsutrygd nýttar.

**§ 32.** Um útrokning hjá Heilsutrygd og krav frá privatstarvandi sálarfrøðingi ikki samsvara, kunnu báðir partar krevja eina nágreiniliga útgreining. Útgreiningin skal so frægt til ber vera liðug áðrenn næsta avrokningarmánað.

## Kapittul 6 – Gildiskoma og uppsøgn

**§ 37.** Sáttmálin fær gildi 1. januar 2024.
*Stk. 2.* Í sáttmálaskeiðnum kunnu báðir partar siga sáttmálan upp við í minsta lagi 3 mánaða freist at fara úr gildi tann 1. í einum mánaði, tó í fyrsta lagi 1. juli 2027.
*Stk. 3.* Eru partarnir samdir um at broyta einstakar partar í ásetingunum í sáttmálanum, kann hetta verða gjørt í sáttmálatíðini uttan uppsøgn.

Tinganes 29. februar 2024

| *Akademikarafelag Føroya* | *Føroyskir Sálarfrøðingar* | *Fíggjarmálaráðið* |
|---|---|---|
| *Páll Nolsøe* | *Signhild Johannesen* | *Ruth Vang* |
| *formaður* | *forkvinna* | *landsstýriskvinna/* |
| | | *Súsanna Nolsøe* |

**Talva til sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroyskar Sálarfrøðingar**

| | | Grundgjald | Gjald | Borgari | Heilsutrygd | Lutfalsligur vøkstur í samlaða gjaldinum fyri hvønn borgara | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Einstaklingaviðtala | 1.020,00 | 1.020,00 | 612,00 | 408,00 | | |
| 2 | Tveypersónaviðtala | 2.040,00 | 2.040,00 | 612,00 | 816,00 | 100% | |
| 3 | Bólkaviðtala við 3 persónum | 2.856,00 | 2.856,00 | 571,00 | 1.142,00 | 40% | |
| 4 | Bólkaviðtala við 4 persónum | 3.427,20 | 3.427,00 | 514,00 | 1.371,00 | 20% | |
| 5 | Bólkaviðtala við 5 persónum | 3.564,29 | 3.564,00 | 428,00 | 1.426,00 | 4% | |
| 6 | Bólkaviðgerð við 6 persónum | 3.706,86 | 3.707,00 | 371,00 | 1.483,00 | 4% | |
| 7 | Bólkaviðtala við 7 persónum | 3.855,13 | 3.855,00 | 330,00 | 1.542,00 | 4% | |
| 8 | Bólkaviðtala við 8 persónum | 3.970,79 | 3.971,00 | 298,00 | 1.588,00 | 3% | |
| 9 | Bólkaviðtala við 9 persónum | 4.089,91 | 4.090,00 | 273,00 | 1.636,00 | 3% | |